Sosialurin

## Hósdagin



### Sleppið frá fótsoppi

Fótasoppur er ein tann mest vanliga soppaígerðin, sum trívist best í hita.

## Fríggjadagin



### Mítt dreymalandslið

Jóannes Jakobsen og Óli Johannesen hava verið verjuálitini, tá Føroyar hava spælt í altjóða fótbólti. Vit hava biðið liðskipararnar báðar seta saman sítt dreymalandslið, mannað við spælarum frá 1988-2006.

Fótbóltur 06 er partur av VikuskiftisSosialinum

## Fríggjadagin



### Súrlig nátt í Keypmannahavn

Tað kendist sum um, at Kári P. var komin heim, tá hann skapti bíðiróð uttan fyri Skarv. Sosialurin var við tá útisetatrubadururin fylti føroyska vertshúsið í Keypmannahvn. Lesi frásøgn frá gandakendu veitlsuni.

# HF næmingar fáa væntandi prógvini

**Tær 20 høvuðsuppgávurnar hjá næmingum á 2 HF, ið eru raktar av ósemjuni millum Yrkisfelag Studentaskúla- og HF-lærara og Mentamálaráðið verða væntandi rættaðar, sigur formaðurin í Yrkisfelagnum**

ÓSEMJAN Í HOYDØLUM
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Landstýrismaðurin í Mentamálum segði í tinginum fríggjadagin, at hann ætlar sær ikki at takað aftur ávaringarnar, ið hann hevur givið 12 lærarum á Føroya Stundentaskúla og HF-Skeiðið fyri at hava luttikið í arbeiðssteðgi, ið fakfelagið hjá lærarunum hevði lýst. Hann sigur, at málið liggur hjá Løgtingsins umboðsmanni, og áðrenn avgerð er tikin í hesum máli, verða ávaringarnar ikki tiknar aftur.

Hans Andrias Sølvará formaður í Yrkisfelag Studentaskúla- og HF-lærara, sigur støðan hjá felagnum eisini er óbroytt. Høvuðsuppgávurnar, ið 20 næmingar á HF skeiðnum lótu inn verða ikki rættaðar fyrr enn ávaringarnar verða tiknar aftur. Eisini hevur felagið fyrr boða frá, at limir felagsins ikki fara at luttaka í arbeiðinum í uppgávunevndunum, ið gera uppgávurnar til próvtøkurnar. Støðan tykist læst. Men so er ikki sambært Hans Andrias Sølvará, ið hevur góðar vónir um, at málið verður loyst við samráðingum. Samband er í millum partarnar, og vit vóna og vænta, at ein loysn verður funnin skjótt, sigur formaðurin.

Eisini úr Mentamálaráðnum verður sagt, at Mentamálaráðið og Yrkisfelag Studentaskúla og HF-lærara arbeiða við at finna eina loysn, soleiðis at tað ikki kemur at nerva próvtøkurnar í summar, og at næmingarnir tískil fáa prógv til tíðina.

Vararektarin á Føroya Studentaskúla og HF-skeiðið Jákup P. Strøm, sigur, at sum er, verða tær 10 uppgávurnar, ið vóru lætnar inn, áðrenn arbeiðssteðgurin varð lýstur, rættaðar. Hinar 20 uppgávurnar verða í løtuni ikki rættaðar. Hann ynskir annars ikki at úttala seg um málið og vísir til, at málið liggur hjá Mentamálaráðnum.



# Ósemjan er eitt stríð um undantøk

**Spurningurin um, hvør støða kann metast at vera eitt undantak, er høvuðsorsøkin til, at Mentamálaráðið og Studentaskúla og HF-lærara enn ikki hava skrivað undir nýggjan sáttmála**

ÓSEMJAN Í HOYDØLUM
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Orsøkin til ósemjuna millum Mentamálaráðið og Yrkisfelag Studentaskúla og HF-lærara er at finna í upptøkuni í fjør summar. Tá vóru 77 næmingar tiknir upp á málsligu deild á Føroya Studentaskúla og HF-skeiðið. Tá hægsta mark fyri næmingatal er 24 næmingar, var talið ov høgt til tríggjar flokkar. Mentamálaráðið metti hetta vera eina undantaksstøðu og kundi tí sambært protokollati frá 14. mai 2001, fara upp um vanliga næmingahámarkið í hvørjum flokki. Áðrenn myndugleikin tekur avgerð um hetta, skal málið verða sent Yrkisfelag Studentaskúla og HF-lærara til ummælis. Men í hesum føri var Yrkisfelagið ikki samt í, at talan var um undantak, men heldur um eina skipaða ætlan. Mentamálaráðið valdi, tó at halda fast í síni avgerð, og tók stig til at 3 flokkar vóru á málsligudeild.

Tá vit spurdu í Mentamálaráðnum í morgun, var henda sama orsøk førd fram. Vit fingu innlit í bræv, ið varð sent til Yrkisfelag Studentaskúla- og HF-lærara 2. oktober í fjør. Her stendur: "Tað, at felagið leggur arbeiðið niður, tí felagið er ikki samt í tulkingini hjá arbeiðsgevaranum, tað er ikki tað sama, sum at leggja arbeiðið niður, tí sáttmálaloysi er. Sáttmálasamráðingar hava ikki verið millum Fíggjarmálaráðið og Yrkisfelag Studentaskúla- og HF-lærara um nýggjan sáttmála."

**NUD**

# Tingmenn vilja hava Landstýrismannin at taka ávaringar aftur

**Á tingfundi fríggjadagin heittu tinglimir í samgongu og andstøðu á landsstýrismannin í mentamálum um at taka aftur ávaringarnar til 12 lærarar á Føroya Studentaskúla og HF-skeiði. Javnaðartingmaðurin John Johannesen ivaðist í, um landsstýrismaðurin ikki mundi vera farin út um sínar heimildir**

ÓSEMJAN Í HOYDØLUM
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Á tingfundinum fríggjadagin spurdi tingmaður javnaðarflokksins, John Johannesen, landstýrismannin í mentamálum Jógvan á Lakjuni um politiskar og løgfrøðisligar grundgevingar fyri at geva 12 lærarum á Føroya Studentaskúla og HF-skeiði ávaringar fyri at luttakað í arbeiðssteðgi í fakfelagið hjá lærarunum hevði lýst. John Johannesen segði m.a., at hann helt, at í hesum málinum var landstýrimaðurin farin útum sínar heimildir, og átti at tikið stig til at tikið ávaringarnar aftur ongantíð ov skjótt.

Svarið hjá landsstýrismanninum var sera langt og lýsti alla málsgongdina. Hetta fekk løgtingsmenn bæði í andstøðu og samgongu at finnast at landstýrismannium fyri at grugga málið.

### Metingar hjá løgfrøðingum

Landstýrismaðurin greiddi frá, at grundgevingin fyri ávaringarnar var ein løgfrøðilig meting gjørd av løgfrøðingum í Fíggjarmálaráðnum og Mentamálaráðnum, um at arbeiðssteðgurin var ólógligur.

John Joannesen var ikki nøgdur við svarið, og metti ikki at landstýrismaðurin hevði greitt frá, hvørjar hesar løgfrøðiligu grundgevingar vóru.

Landstýrismaðurin vísti tó í svari sínum á, at orsøkin var, at løgfrøðingarnir ikki mettu, at talan var um sáttmálaloysi, sum Yrkisfelagið annars hevði sum orsøk fyri arbeiðssteðginum. Tí samráðingarnar um nýggjan sáttmála ikki vóru farnar í gongd, og tá er siðvenja at fari verður undir sáttmálasamráðingar, tá ein sáttmáli gongur út. Men landstýrismaðurin viðgekk, at avgerðin at geva lærarunum eina ávaring, var hansara.

### Skuldu boða limunum frá ávaringini

Landstýrismaðurin segði í svari sínum til John Johannesen, at Mentamálaráðið dagin fyri verkfallið boðaði Yrkisfelagnum frá. At um lærarar niðurløgdu undirvísingina, var talan um fráveru uttan lógliga grund, og at hetta fór at fáa avleiðingar fyri teir. Mentamálaráðið gav Yrkisfelag Studentaskúla- og HF-lærara boð um at boða avvarðandi lærarum frá, at arbeiðsgevarin ætlaði at geva ávaring fyri ólógliga fráveru, og at um ólóglig frávera endurtekur seg, so verða stig tikin til at burturvísa lærarunum úr starvinum.

Hesum funnust eitt nú Høgni Hoydal og Annita á Fríðriksmørk hvassliga at, og kallaðu tað eina roynd at sáa split millum fakfeløg og limir, tey mettu, at hetta var ein partur av eini røð av átøkum hjá samgonguni at leggja eftir og ikki virða fakfeløg.

### Hvar er løgmaður

Bæði Annita á Fríðriksmørk og Høgni Hoydal spurdu eisini um, hví løgmaður, ið hevur eftirlit við landsstýrismonnunum, helt seg burtur frá málinum. Tey vístu á, at vit hava ráðharraábyrgd og løgmaður átti at kannað málið, heldur enn, at tað skuldi verið neyðugt, at tað endaði hjá umboðsmanninum.